## Gibralatar vil upp í UEFA

Enn ein pinkutjóð í Europa vil sleppa at spæla fótbólt við teimum stóru. Gibraltar hevur søkt um limaskap í europeiska fótbóltssambandinum UEFA, og umsóknin skal viðgerast í januar mánaði. Tað búgva 30.000 fólk í Gibraltar, sum bara er 10 ferkilometrar til støddar. Spania er ímóti, at Gibraltar fær limaskap í UEFA, og í Spania hevur verið roynt at gera umsóknina politiska. Tað hevur formaður í fótbóltssambandinum í Gibraltar funnist harðliga at.



## Eriksson spøkir í West Ham

Fyrrverandi enski landsliðsvenjarin í fótbólti, Sven Gøran Eriksson, sigst nú at vera upp á tal sum nýggjur venjari í enska felagnum West Ham. Sviin hevur ikki havt nakað starv, síðani hann gavst sum enskur landsliðsvenjari í summar, men enskir fjølmiðlar vilja verða við, at hann kann gerast næsti venjarin í Premier League felagnum. Tosað hevur verið um, at iranski ríkmaðurin Kia Joorabchian ætlar at keypa felagið, og tí skal Eriksson nú verða upp á tal sum venjari í felagnum.

# NSÍ má aftur á rætta kós

**NSÍ segði í vikuni venjaran úr starvi. Nú vóna teir, at liðið kemur aftur á rætta kós, men tað verður uttan Pól Thorsteinson, sum hevur leikbann. Skála, sum liggur mest sum í ongamannalandi, hevur allar mans tøkar, og teir ætla sær øll trý stigini sunnudagin**




**SKÁLA-NSÍ**

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Skála og NSÍ møtast í grannauppgerð á Skála sunnudagin. Heimaliðið hevur ikki tað heilt stóra at spæla fyri, men teir siga, at teir ætla sær øll stigini móti grannunum úr Runavík. NSÍ hevur hinvegin nógv at spæla fyri. Teir liggja í løtuni á fjórða plássi, bert tvey stig frá einum medaljuplássið, og teir hava ikki ráð at missa nakað stig, eftir at teir hava tapt tríggjar dystir á rað.

Hjá Skála sær gott út við fólki. Einasta ivamálið er Bjarni Jørgensen, sum hevur verið skaddur í longri tíð. Hann hevur spælt onkran dyst á næstbesta liðnum, men tað verður ikki roknað við, at hann verður tøkur til dystin sunnudagin.

### Pól leikbann

Í Runavík mangla teir ein av týdningarmestu leikarunum, Pól Thorsteinson. Hann fekk reytt kort í dystinum á Mølini seinast, og tí verður hann ikki við. Óli Hansen er tó klárur aftur eftir leikbann. Eisini Helgi L. Petersen er komin heimaftur úr Danmark, og í Runavík meta tey, at hann verður partur av liðnum móti Skála.

NSÍ hevur vunnið báðar undanfarnu dystirnar hetta kappingarárið móti Skála, men teir báðir dystirnir hava verið við Løkin í Runavík. Nú verður dystur á Skála, og spennandi verður at vita, um venjaraskiftið fer at hava røttu ávirkanina á runavíkingar, sum veruliga hava brúk fyri øllum stigunum eftir trý tap á rað.

## Clayton heldur fram í B71

Toppskjúttin í næstbestu deildini, Clayton Soares, hevur júst gjørt nýggjan 2-ára sáttmála við B71, har hann hevur spælt seinastu trý árini. B71 liggur til at flyta upp í bestu deildina næsta ár, og tað er ikki minst takka verið teimum mongu málunum frá Clayton. Onnur feløg hava víst áhuga fyri toppskjúttanum, men nú hevur hann gjørt av at spæla við B71 næstu tvey árini. Clayton Soares hevur skotið 36 mál í kappingini í ár, men fyrradagin misti hann 11 mál, tá ið VB/Sumba varð koyrt úr kappingini í 1. deild.

## Claus kann spæla fyrsta dyst

Claus Bech Jørgensen kann leygardagin spæla sín fyrsta dyst fyri Blackpool, sum hann júst er farin at spæla við. Tað var beint fyri evstamark 31. august, at Claus skifti frá Coventry til Blackpool, sum spælir í triðbestu ensku deildini. Síðani hevur Claus boðað frá, at hann gevst at spæla á føroyska landsliðnum, har hann hevur spælt 10 landsdystir. Claus sigur, at hann hevur mist hugin at spæla við føroyska landsliðnum, og tí gevst hann. Nýggja felagið hjá honum hevur bara fingið fimm stig í seks teimum fyrstu dystunum, og liðið liggur nummar 20 av 24 liðum í deildini. Leygardagin spælir Blackpool á útivølli ímóti Port Vale, sum er at vinna ovarliga á stigatalvuni. Port Vale liggur nummar 3 og hevur í hesum kappingarárinum vunnið tveir heimdystir og tapt ein.

# B36 ætlar at halda lív í FM-vónini

**Dysturin ímóti botnliðnum B68 sunnudagin skal vinnast, um B36 skal varðveita ein lítlan møguleikan at koppa oddaliðnum EB/Streymi. B68 manglar tveir av sínum stuðulsspælarum til dystin**

**B36-B68**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sunnudagin hittast næstfremta og næstaftasta liðið í Formuladeildini í Havn. B36 tekur ímóti B68, og liðini hava hvørt sítt mál fyri framman.

B36 ætlar sær at varðveita møguleikan at vinna FM í ár, og B68 stríðist fyri at sleppa undan hóttandi niðurflyting. Stigini hava nógv virði, og javnleikur er ov lítið hjá báðum liðunum at fáa burturúr.

B36 liggur fimm stig aftanfyri EB/Streym, sum tykist hava sett ferðina upp fram ímóti FM-gullinum. Føroyameistararnir ætla tó ikki at geva seg uttan harðan dyst, og sunnudagin skulu teir hava trý stig burturúr.

B36 hevur so at siga allar spælararnar tøkar til dystin. Einasta ivamálið er Bergur Midjord, sum hevur drigist við skaða í nakrar vikur og ikki hevur fingið vant ella spælt við fullari ferð. Bergur venur nú aftur, men spurningurin er, um hann er heilt klárur til dystin ímóti B68.

### B68 manglar tveir

Toftamenn fara til Havnar uttan tveir av sínum føstu spælarum. Øssur Hansen, sum hevur verið millum teir bestu hjá B68 í hesum kappingarárinum, verður ikki við sunnudagin. Hann arbeiðir uttanlands og er bara heima til tíðir. Nú hevur hann so eisini fingið leikbann, og tí kann hann ikki spæla ímóti B36.

Kári Hansen hevur verið ein av spælarunum í verjuni hjá B68 í ár, men hann er heldur ikki tøkur hesaferð, tí hann er skaddur. Harvið mangla tveir spælarunum, sum hava verið við at manna verjuna hjá B68 í nógvum dystum í ár.

- Vit mangla tveir spælarar, men vit eru klárir til dystin sunnudagin. Okkara mál er at sleppa undan niðurflyting, og vit hava brúk fyri stigum í tøttu kappingini við ÍF og VB/Sumba, sigur Bill M. Jacobsen, venjari hjá B68




*B36 stríðast fyri FM-møguleikan, meðan B68 stríðist fyri lívinumí bestu deildini. Sunnudagin hittast liðini í Havn*